# Ring til Brasiliu fyri 0,62 kr. um minuttin

**Birgir Waag Høgnesen, sølumaður hjá TeleTech, sigur, at teir fyri stuttum gjørdu avtalu við eina dansk/ amerikanska fyritøku um Net-telefoni við sera lágum prísum**



SAMSKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyritøkan, TeleTech, var fyrsta telefyritøka eftir Føroy Tele, sum fekk fjarskiftisloyvið, eftir at nýggja fjarskiftislógin varð sett í gildi í Føroyum. Síðani tá hevur TeleTech selt tráðleyst internet í Vestmanna, Suðurstreymoy, Eysturoy og í Norðoyggjum, og tað hevur gingist rættiliga væl. Fyritøkan, sum heldur til í J. C. Svabosgøtu í Havn, er nú komin á marknaðin við eini vøru, sum væntandi fer at geva inn-og útflutningsvinnuni og teimum, sum hava vinir og kenningar uttanlands, eina rættiliga lækking í telefongjøldum. Birgir Waag Høgnesen, sum er sølumaður hjá TeleTech sigur, at teir fyri stuttum gjørdu avtalu við eina dansk/ amerikanska fyritøku um Net-telefoni við sera lágum prísum.

Hann sigur, at TeleTech Net–telefoni er soleiðis háttað, at tú við telduna kanst ringa beinleiðis á eina vanliga telefon uttanlands, tí sambandið verður leitt ígjøgnum internetið til ta útlensku telefonina.

– Vit hava arbeitt við ætlanini nú í longri tíð, sigur hann og vísir á, at teir í fyrsta umfari hava valt at seta TeleTech Net-telefoni á skinnaran.

Birgir sigur, at seinni er ætlanin at selja vanligar Ip-telefonir, sum skulu setast til ta vanligu borðtelefonina, men telefonsambandið verður tá framvegis leitt í gjøgnum internetið.

### Riggar væl

– Vit hava royndarkoyrt Net-telefoni-skipanina eina tíð, og vit halda, at hon riggar avbera væl. Vit gleða okkum nógv til at geva føroyingum ta bíligasta uttanlandsgjaldið, tí tað vísir seg, at vinnuvirkir brúka nógvan pening til uttanlandssamrøður. Her er nógv at spara, sigur sølumaðurin.

Hann vísir á, at við Net-telefoni kann brúkarin sita við telduna við einum headsetti og ringa til eina vanliga telefon ella eina mobiltelefon í útlandinum fyri serstakliga lágar prísir á www. leita.fo.

– Brúkarin kann fara inn á heimasíðuna www. leita.fo og trýsta á ovasta bannaran í høgru síðu og har tekna seg fyri einum haldi, sigur Birgir.

*– Bæði ung og gomul duga at brúka telduna í samband við Net-telefoni. Eitt nú kunnu foreldur í Føroyum brúka henda møguleika til at tosa við síni børn í útlandinum og spara nógvan pening – ja, rættuliga nógvan pening, sigur Birgir W. Høgnesen, sølumaður hjá TeleTech*

At tekna seg fyri einum haldi av hesi telefonskipan, kostar einki, og enntá fær brúkarin 1 dollara ókeypis, sum eina roynd.

– Bæði ung og gomul duga at brúka telduna í samband við Net-telefoni. Eitt nú kunnu foreldur í Føroyum brúka henda møguleika til at tosa við síni børn í útlandinum og spara nógvan pening – ja, rættuliga nógvan pening. Birgir sigur, at sum dømi kann nevnast, at ein samrøða til Brasiliu kostar bert 0,62 krónur um minuttin, meðan hesin sami minuttur kostar einar 12 krónur hjá hinum televeitarunum.

Hann sigur, at kostnaðurin til eitt nú Fraklands er 0,31 krónur og hjá hinum 2,24 krónur.

### Einføld skipan

Birgir vísir á, at brúkarin keypir sína talugávu ella talutíð við bankaflyting, ella tey kunnu brúka FR/-Dankort á www. leita.fo.

– Eftir lítlari løtu fær brúkarin brúkt talutíðina, hann hevur keypt. So hvørt, brúkarin er liðugur at tosa, sæst, hvussu nógvur pengur er eftir av talutíðini. So, hetta er ein einføld og bílig skipan, leggur hann afturat.

Sølumaðurin vísir á, at TeleTech selir tráðleyst internet, og er tað serliga teirra egnu viðskiftafólkum, fyritøkan vil veita eina tænastu við hesi skipan.

Hann vísur á, at breiðbandsviðskiftafólk hjá hinum veitarunum eisin kunnu njóta gott av hesi tænastu, tí TeleTech Net-telefoni-tænastan á www. leita.fo er ikki avmarkað til viðskiftafólkini hjá TeleTech, men er til allar føroyingar.

– Við tráðleysum interneti ella breiðbandi er dygdin avbera góð, men hetta er sjálvandi treytað av, at ljóðkortið er nóg stórt, sigur Birgir W. Høgnesen at enda.

# Menningartarnað saman við Ogga

**Á Verkhúsinum Stíggjur arbeiða tey nógv við list, og á Varmakeldu fáa vit onnur eisini høvi at síggja úrslitið. Tað eru Dagmar Beder og Oggi Lamhauge, sum hava lagt teimum menningartarnaðu lag á, og hesuferð vera grafisku verkini hjá Ogga eisini við á listaframsýningini.**




*Dagmar Beder er ein av stigtakarnum til listaframsýningina hjá teimum menningartarnaðu á Varmakeldu. Hon starvast dagliga á Verkhúsinum Stíggjur, har hon og Oggi Lamhauge hava lagt brúkarnum listraligt lag á*

LISTAFRAMSÝNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

– Ein listaframsýning er ein frálíkur møguleiki hjá teimum menningartarnaðu at vísa, hvat ið rørir seg innaní teimum. Og hjá okkum øðrum at skilja tey betri. Tað, tey kanska ikki duga so væl at seta orð á, duga tey ofta serliga væl at fáa fram við litum og blýanti ella í lutum, tey evna við hondunum, sigur Dagmar Beder, sum starvast á Verkhúsinum Stíggjur.

At kroppslig ella sinnislig brek ikki nýtast at vera nøkur forðing fyri listarligum avrikum, hava tey á Stíggi longu prógvað so dyggiliga. Listaframsýningin hjá teimum í Riberhúsi í Fuglafirði síðsta heyst eydnaðist so væl, at tey hava fingið hug at royna seg aftur. Hesuferð fara tey at sýna fram í Stórhúshøll í Fuglafirði á Varmakeldu.

### Ein onnur mynd

– Tá Verkhúsið Stíggjur fylti 10 ár síðsta heyst, vildu vit og brúkarnir fegin gera okkurt serligt burturúr. Og vit hildu, at hugskotið við eini listaframsýning var frálíkt. Bæði tí tað var øðrvísi, og eisini tí vit leingið høvdu fingist við list, men kanska saknaðu okkurt ítøkiligt at arbeiða fram ímóti, sigur Dagmar.

– Tey vóru sjálvandi fegin um at fáa møguleika at vísa sína list fram, men stóri áhugin fyri framsýningini kom púra óvart á tey. Og tað sigur seg sjálvt, at tað eisini var serliga hugaligt hjá teimum menningartarnaðu at vera í fokus í sambandi við nakað heilt annað enn tvørligar møguleikar ella vantandi tilboð, sum vit so ofta hoyra um, sigur Dagmar.

Tað er onki at dylja yvir, at umrøðan av teimum brekaðu í fjølmiðlunum ofta er rættiliga einsháttað. Og hetta ger uttan iva sítt til, at vit ofta hava lyndi til at bólka øll brekað undir einum og halda tey øll vera meir ella minni líka.

– Tey menningartarnaðu eru minst líka ymisk, sum øll vit onnur, sigur Dagmar. Til dømis er tað als ikki øll á Verkhúsinum, sum tíma at fáast við list. Og tey, sum tíma, prógva uppaftur meir, hvussu ymisk tey eru, tí tey hava øll hvør sítt sermerkta listarliga eyðkenni.

### Oggi eisini við

Tað er Dagmar, sum saman við Ogga Lamhauge, pedagogi og grafikara, hevur lagt teimum menningartarnaðu listarligt lag á. Oggi fæst eisini sjálvur við list, og hesuferð verður hann eisini við á framsýningini.

– Oggi hevur verið ótrúliga hjálpsamur og stimbrandi fyri listarliga arbeiði her í húsinum. Og tey menningartarnaðu vildu fegin vísa hon sítt takksemi við at at biðja hann vera við á framsýningini. Men Oggi er eisini ein avbera góður listamaður sjálvur, so nú fáa onnur eisini høvi at síggja verkini hjá honum. Tað ger bara framsýningina uppaftur meir áhugaverda, heldur Dagmar.

Listaframsýningin »Menningartarna saman við Ogga« verður at síggja í Stórhúshøll í Fuglafirði í døgunum 1. til 4. juli.







Pakkaferðir til London

Fráferðir eru 18. og 25. juli

Fyri hvønn í tveymanskamari í 1 viku
6.985,-
Einakamar: Kr. 8.650,-

Gist verður á fralíka 3★★★ Queen Park Hotel í Bayswater. Ikki langt frá Hyde Park og Oxford Street. Vælkendi Portobello Road leygardags-marknaðurin í Notting Hill Gate er bert fáar minuttir til gongu frá hotellinum.

www.queensparkhotel.com

Íroknað ferðina er:
Flúgving við Atlantic Airways Vagar - Stansted og aftur • Flutningur frá Stansted við bussi og aftur. Við hjálparfólki á staðnum • Gisting í 7 nætur á Queens Park Hotel við morgunmati • Halvdags útferð: London City Tour við skandinaviskum ferðaleiðara • Hálvdagsútferð: Hampton Court Palace & Gardens við skandinaviskum ferðaleiðara • Ein av kendu West-End songleikunum, mánadag ella týsdag við flutningi til/frá hotellinum og skandinaviskum ferðaleiðara.

Ferðatrygging er ikki íroknað prísin.

Fortreytin fyri ferðini er, at í minsta lagi 15 fólk tekna seg.

SANSIR 355 355

Vanligir ferðaseðlar kunnu bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo



Hús til sølu

Dalavegur 50 í Tórshavn • Miðskeiðis í býnum við útsýni yvir Havnina



Húsini eru vælhildin og standa høgliga fyri í veðurgóðum umhvørvi miðskeiðis í býnum við útsýni yvir Havnina. Húsini eru í tveimum hæddum við einum høgum útbygningi á miðhæddini. Uttanfyri er stórur urtagarður.
**Miðhædd:** Gongd, køkur, stór stova, loftstova, 2 kømur, baðirúm við gosbað/toilett, gestatoilett og hjallur.
**Kjallarahædd:** 3 kømar, goymslurúm, fýr og vaskirúm, toilett. Uttanfyri er stórt "fjós", sum er innrættað og hevur verið brúkt sum seymistova. Húsini kunnu einsvæl nýtast til skrivstovuvirksemi av ymiskum slag.

| Um húsini: | |
|---|---|
| Byggiár: | 1987 |
| Vídd á grundøki: | 1124 fermetrar |
| Innrættað vídd | 280 fermetrar |

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

inni
- trygt og ómakaleyst til hús

Inni P/f • N. Finsensgøta 37 • 100 Tórshavn
Tel 320410 • Fax 320510



mazda

Størsta goymslan av nýggjum bilum í landinum!
Fjølbroytt úrval fyri bestu prísir

MAZDA 2 diesel
úr 172.700,-
íroknað skráseting og radio



MAZDA 3
úr 176.700,-
íroknað skráseting og radio



MAZDA 6
úr 198.700,-
íroknað skráseting og radio



MAZDA Premacy
úr 187.700,-
íroknað skráseting og fløgusp.



Sosialurin 31820

MAZDA B2500
úr 157.700,-
íroknað skráseting og fløgusp., lastinnsats, og rustviðgerð



MAZDA MPV
úr 278.700,-
íroknað skráseting og fløgusp.



T.d. er Mazda 6 18.000,- kr bíligari enn sama stødd av bili hjá bíligasta kappingarneytanum

BERG MOTORS
STARAVEGUR 1-3 • TEL 31 35 35 • FAX 31 77 35 • WWW.BERGMOTORS.FO